# Geva gamlari mentan nýtt lív

**Í Dali skipa tey fyri kvøldsetum, har vitjandi sleppa at vera við í tí, sum gjørt verður. Eitt nú at karða og spinna. Og hevur tú hug at liggja nátt, ber tað eisini til**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Sandoy:** Tú kanst sleppa til eina kvøldsetu í Dali, drunnhvítatúr í Skálavík og so aftur til Dals at sova. Alt í einum, um væl vil til.

Sandoyggjafólk hava ymisk tilboð til ferðafólk, sum vitja oynna. Í Dali eru ymisk tilboð til ferðafólk, sum koma til bygdina, greiðir Vilhelmina Larsen í Dali frá. Eitt nú tær kvøldseturnar, sum tey plaga at skipa fyri í Eiriksgarði, umframt at tað eisini ber til at fáa Ból og Bita í Dali. Eisini kunnu fólk leiga sær Eiriksgarð eitt nú eitt vikuskifti ella fyri tann skuld eisini mitt í viku. Bæði smærri familjur og størri bólkar, sigur hon.



*Vilhelmina Larsen er ein teirra, sum í summar fer at skipa fyri kvøldsetum í Dali. Eisini tekur hon ímóti ferðafólki, sum ynskja at gista í bygdini*

*Mynd: Edvard Joensen*

Hetta verður gjørt í samráð við og eftir ávísing frá Kunningnarstovuni Heima á Sandi, greiðir hon frá. Samstarvið við Kunningarstovuna riggar væl.

Ætlanin er í summar at hava tríggjar kvøldsetur í Eiriksgarði, sigur Vilhelmina Larsen. Har sleppa fólk at síggja og royna, hvussu føroyskt ullaarbeiði fór fram í gamlari tíð, tá fólk sótu í roykstovuni og hugnaðu sær, samstundis sum tað neyðuga arbeiðið vaðr gjørt.

Børnini spældu á gólvinum við tað, tey tá høvdu, og tað fara dalsbørn eisini at gera á hesum kvøldsetunum, sigur hon.

Tað verður í tí rætta umhvørvinum, tí tey seta ein stovu upp við øllum tí, har var í gamlari tíð, grieðir Vilhelmina Larsen frá.

Tey vaksnu fara at loysa úr lagdi. Nappa, karða spinna og binda. Og tí sleppa tey vitjandi eisini at luttaka í, greiðir hon frá. Tað skal ikki vera so, at fólk bara sita og hyggja at eini framsýning. Tey skulu luttaka aktivt.

Ein stórur partur av kvøldsetunum í Dali er sangur. Felagssangur, sum teimum sjálvum dámar sera væl har suðuri. Og undirspælið plagar at vera gott, tí spælimenninir eru frálíkir í Dali, láta tey at. Teimum dámar best at syngja úr Sangbók Føroya fólks.

Sum vera man verður eisini farið upp á gólv. Og tað er Eiriksgarður sera væl egnaður til, siga tey, sum hava roynt at dansa í húsinum.

Matur fæst eisini. So sum smurt breyð, føroyskur drýlur við føroyskum viðskera, og um ynskist, kann eisini døgurði fáast.

Eru tað so fólk, sum vilja liggja nátt, ber tað eisini til, sigur Vilhelmina Larsen.

Hon hevur tað, sum útlendingar kenna sum Bed & Breckfast, á føroyskum Ból og Biti.

# Danir dyrgja eftir føroyingum

**Flogfelag Føroya gevur gjørt samstarvsavtalu við danska ferðavinnufelagið, Bravo Tours, sum vil hava føroyingar at ferðast suður eftir at sóla sær**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Flogfelag Føroya er vorðið umboð hjá danska ferðavinnufelagnum Bravo Tours í Føroyum. Tað ber í sær, at ferðir, sum gjørdar verða við Bravo Tours úr Føroyum, skulu keypast beinleiðis á skrivstovunum hjá Flogfelag Føroya í Havn ella á flogvøllinum í Vøgum.

Í samband við avtaluna millum Bravo Tours og Flogfelag Føroya bjóðar danska felagið føroyingum tilboðsferðir til Svartahavið og út á Azorurnar í mei og juni maðnaða.

14. mei verður túrur gjørdur til bulgarsku Svartahavsstrondina í eina viku fyri. 4.650 krónur, sigur stjórin í Bravo Tours, Peder Hornshøj.

6. og 13 juni ber til at sleppa til Azorurnar í eina viku fyri 5.750,- krónur. Ferðirnar verða gjørdar úr Føroyum umvegis Keypmannahavn, og búð verður á fýrastjørnaðum hotelli.

Peder Honshøj sigur, at ferðingin úr Danmark víðari suðureftir fyri tað mesta er við Maersk Air.

Star Tour leggur seg í høvuðsheitinum eftir at selja charterferðir til sólríkar, suðurlendskar strendur.

– Hetta tykist verða ein ferðaháttur, sum føroyingum dámar væl, sigur Peder Hornshøj, sum leggur afturat, at Bravo Tours longu hevur selt fleiri bólkaferðir til føroyingar, sum hava vitjað hesi frítíðarplássini sunnanfyri.

Felagið hevur tó annað enn charterferðir til sólstrendurnar sunnanfyri, sigur stjórin í Bravo Tours. Eitt nú eru safari ferðirnar til Afrika eisni væl umtóktar, letur hann at.

Bavo Tours varð stovnað í Herning í 1999 og hevur høvuðssæti har, men er seinni víðkað við søluskrivstovu i Keypmannahavn.

Felagið nýtir flogfeløg á høgum støði so sum Maersk Air og Sterling, sigur stjórin. Flogið verður suðureftir úr Keypmannahavn, Billund og Aalborg ella somu lufthavnum, sum Atlantsflog flýgur til úr Føroyum, sigur hann.

Bravo Tours hevur ferðaleiðara, sum tosar danskt, á øllum støðunum, tey senda ferðafólk til.

Nógv tann største parturin av tí, felagið selur, eru charterferðir, sigur sjtórin. Ikki fyrri enn 98 prosent av søluni eru slíkar ferðir.

– Hetta passar væl til ferðamynstrið hjá Føroyingum, sigur Peder Hornshøj, sum vísir á, at føroyingum dámar væl at ferðast i felag, eitt nú við charterferðum, har ferðaleiðari er knýttur at. Tað er tryggleikin, sum telur, sigur hann.



*Tað eru nógv vøkur støð at vitja sunnanfyri*